“Nú skal vend koma í" segði hann, vendi sær og svav víðari.
**Kvinna, 40 ár**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

# Miðlamjørr



*”Vit eru so leingi, sum vit eru í hesari samgonguni í einum borgarligum mjørkatámi, sum ger tað trupult hjá okkara fólki at kenna okkum aftur.*

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, í formansrøðuni á landsfundinum

Mín andaligi heimstaður, fólkakirkjan, sum eg eri føddur inn í, er eitt kempi paradoks. Trúarjáttanin lærir meg, at eg skal avnokta djevulin, allar gerningar hans og allan atburð hans, og Jesus sjálvur lærir meg í Matt. 5.38, at eg skal ikki seta meg móti tí ónda. Hvussu kann eg avnokta tað illa, tá ið tað illa fær meg at fáa eyga á tað góða?
**Maður, 53 ár**

*”Eg var spælivinur hjá kongi.*

Camilla Henemark um hennara ivasama forhold til svenska Carl Gustav kong (Expressen)



Nú eru tíðindini blivin, sum tey vóru í 90’unum: Fiskur, korruption og bankar. Nú er liðugt við frískúlum, homoseksuellum og ellisheimsbyggingum :)
**Maður, 22 ár**

Kundi hugsa mær at stilla upp til ting og arbeitt fyri at øll børn skulu einans fáa sondumat inntil tey fara í skúla!
**Kvinna, 35 ár**

*Eg elski at vera nakin. Tá eg eri heima, kunnu fólk síggja meg, sum eg eri fødd.*
Sjónleikrin Halle Berry (The Ellen DeGeneres Show)



*”Nú!*

Munnavlesarar hald seg síggja, at boksimeistarin David Haye gav mótstøðumanninum Audley Harrison boð um, at hann skuldi lata seg sláa út í triðja umfari av dysti teirra millum (The Sun)





*”Vit vóru impotentir og høvdu eina metroseksuella bóltmassasju.*

Silkeborg-venjarin Troels Bech eftir dyst farna vikuskiftið. Hetta var í vikuni kosið til besta sitat í donskum fótbólti í ár (DR)



*”Nú fáa vit at síggja, hvat hendir.*

Karen Marie Olesen, fúti, tá ið hon verður spurd, um Føroyar eru til reiðar at taka ímóti einum Mohammed-teknara, sum vil búgva í Føroyum (Vágaportalurin)

**Søga:** Írar fluttu til USA í hópatali, men teir komu til Føroyar langt áðrenn. Víkingarnir løgdu frá landi yvirum hav, men millumlendu í Føroyum. Fleiri av ævintýrfararnum, sum fóru til Vínlands, løgdu at landi í Føroyum. Tá sisilianska mafian immigreraði til USA, lupu teir Føroyar um, tí kappingin var ov hørð.
**Maður, 45 ár**